# Sambýlið letur upp

**Sambýlið í Sandaváig, sum ætlað er sinnisveikum at búgva í, letur nú upp. Starvsfólkini møttu fyrstu ferð til arbeiðis hósdagin, og um einar fjúrtan dagar ella so, fara búfólkini at flyta inn**

SAMBÝLI
*Edvard Joensen*



*Signa Andreasen er leiðari á sambýlinum fyri sinniveik, sum nú letur upp í Sandavági*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Sandavági:** Sambýlið í Sandavági letur nú endiliga upp. Liðið er umleið hálvtannað ár, síðan eini sethús vórðu keypt til at hýsa sinnisveikum, men ikki fyrr enn nú verður gjørt klárt at flyta inn.

Tey stákast í húsunum Undir Fobbakletti í Sandavági, har níggju starvsfólk í skiftisvaktum skulu vera um tey fimm búfólkini, sum fara at búgva fast í nýggja sambýlinum.

Eftir at hesi sethús í Sandavági fyri umleið hálvumøðrum ári síðan vórðu keypt til at hýsa fólki við sinnisbreki, kom politikkur í málið soleiðis, at tveir landsstýrismenn við ávikavist almannamálum og heilsumálum ikki kundu semjast um, hvør skuldi varða av hesum einstaka málinum. Annar segði seg eiga húsið, og hin fólkini, sum skuldu búgva í húsinum. Hvussu varð og ikki, hendi so ikki meira enn tað, at eitt hús, sum skuldi brúkast til gott endamál, stóð og gapaði tómt í áravís.

Síðan er so leiðari settur fyri sambýlinum, og seinni eisini starvsfólk, og gjørt er av, at trý búfólk flyta inn umleið hálvan juli. Hesi eru fólk, sum flyta av stovni, har tey ikki hava fyri neyðini at búgva, men kortini eru soleiðis fyri, at tey hava tørv á, at onkur er um tey dagliga.

Signa Andreasen úr Vestmanna er sett sum leiðari í nýggja sambýlinum. Av hinum átta starvsfólkunum eru tey flestu úr Vágum, men onkur er úr Havn og onkur úr Vestmanna, sigur hon. Talan er um fólk, sum hava útbúgving og royndir á økinum, sigur leiðarin.

Hon sigur, at hesar fyrstu dagarnar fara starvsfólkini at nýta til fyrireiking. Slíkt sum at gera húsini klár at flyta inn í, læra hvønn annan at kenna og eisini til ymiskt skeiðvirksemi í samband við arbeiðið.

Tey fara at arbeiða í skiftum, sigur Signa Andreasen. Um dagin vera trý starvsfólk til arbeiðis. Tvey verða tey um kvøldið, og ein á náttarvakt.

Búfólkini skulu eisini hava okkurt at gera um dagarnar, sigur hon. Og farið verður nú at finna fram til, hvat tað skal vera. Ymisk ítrivstilboð eru í Vágum, og væl ber eisini til at fara aðrastaðni eisini, um so skuldi verið.

Fyri stuttum lat upp eitt nýtt verkhús í Sørvági, har møguliga onkur teirra, sum fer at flyta inn Undir Fobbakletti, kann fara til arbeiðis. Talan skal helst vera um onkrar fysiskar aktivitetir, sigur leiðarin, men einki er avgjørt enn.

Vanligt er, at slík sambýli fáa egið navn, og tað fer hetta eisini, sigur Signa Andreasen. Men enn er einki avgjørt her heldur. Bara at tosa um Sambýlið í Sandavági, heldur hon vera í so keðiligt, og vildi helst sloppið at givið húsinum eitthvørt lokalt navn, sigur hon.



*Tey nýggju starvsfólkini møttu fyrstu ferð til arbeiðis hósmorgunin. Tey fara nú at fyrireika seg at taka í móti fyrstu búfólkunum, sum flyta inn í aðru viku*

*Mynd: Edvard Joensen*


WWW.SMYRIL-LINE.COM




super AUGUST TILBOÐ

DANMARK

1 VIKA Í DANLAND-ÍBÚÐ
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
DANLAND Í BLOKHUS & HIRTSHALS
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 7.950,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku.

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
DANCENTER-SUMMARHÚS
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 7.780,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku í summarhúsi.

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
SKALLERUP KLIT FERIECENTER
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 9.400,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku á Skallerup Klit Feriecenter.

NOREG

1 VIKA Á PERS HOTEL
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
Í SMÁTTU Í GOL Í NOREGI
9/8, 16/8, 23/8 & 30/8 úr 6.890,-
**Íroknað kostnaðin:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil 7 gistingar í smáttu, uttan kost.



Á FERÐUNUM fara heimskendir pianoentertainarar, sum Stefan Ujvari (NO) og Göran Berndsson (SE) at borðreiða við fjølbroyttum tónleiki umborð.

HETLAND

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
2-RÚMS ÍBÚÐ Í EASTERHOULL CHALETS
9/8, 16/8, 23/8 & 30/8 úr 6.980,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku í summarhúsi.

SMYRIL LINE

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo




# Gransking er ein framtíðaríløga

**Hetta sigur danski professarin frá RUK, John Andersen, sum hevur hildið skeið á granskingardeplinum fyri økismenning í Klaksvík. Skeiðið snúði seg um vælferð, poltitikk og tilrættislegging út frá einum sosialvísundaligum perspektivi**

GRANSKING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Danskur professari frá Roskilde Universitet, John Andersen, hevur hildið eitt tríggjar daga langt skeið á granskingardeplinum fyri økismenning. Hann harmast um, at viðurkenningin av gransking í Føroyum ikki letur til at vera nakað serliga stór*

Jonh Andersen, professari við Roskilde Universitet, heldur, at Føroyar á mangar mátar er eitt sera áhugavert samfelag við sínum fjølbroytni og samanseting av siðum og tí meira nýmótans býarlívinum. Men hann hevur fingið ta fatan, at gransking av samfelagsligum viðurskiftum ikki er so viðurkend í landinum. Hetta heldur hann vera stórt spell.

– Tað er sera umráðandi, at gransking verður sædd sum ein framtíðaríløga heldur enn sum eina útreiðslu, sigur John Andersen.

John Andersen hevur fylgt arbeiðinum á granskingardeplinum í nøkur ár, og sigur hann, at tey gera eitt framúr arbeiði. Tí ørkymlar tað hann, at tað verður skorið í játtanunum til økið.

– Her verður ikki hugt langt fram í tíðina, tí gransking er ein íløga fyri eitt samfelag, sum eg havi sagt áður. Og mær tykir synd í teimum, at tey noyðast at berjast fyri at yvirliva, heldur hann fyri.

### Politiska føðiketan

Danski professarin heldur tað vera av stórum týdningi fyri granskingina, at hon verður ein náttúrligur partur av politisku føðiketuni, sum hann málber seg.

Hetta er so við og við hent í Danmark, men kortini viðgongur hann tó, at gransking enn ikki er so viðurkend á flatlondum, sum hann kundi hugsað sær tað.

Tá tað kemur til gransking, er tað sambært dananum, týdningarmikið, at bæði politikarar og vanliga fólkið ger sær greitt, at hon kann verða við til at varpa ljós á trupulleikar í samfelagnum og at koma við møguligum loysnum.

– Gransking kann somuleiðis gera vart við onkrar gloymdar trupulleikar í samfelagnum, sum politikarar ella myndugleikar ikki eru varðug við eru tilstaðar. Hetta er sjálvandi meira kritisk gransking, men hon skal so sanniliga eisini til, sigur John Andersen.

Sum dømi nevnir hann tey eldru, sum sita einlig úti á lítlum bygdum í Føroyum. Hetta er ein trupulleiki, har boð uppá møguligar loysnir, kundu komið gjøgnum gransking.



*Tilsamans 17 luttakarar vóru á skeiðinum á granskingardeplinum. Umframt tey, ið dagliga starvast har, vóru eisini lesandi og onkur var enntá komin niðrifrá at luttaka á skeiðinum*

### Fyrimunir og vansar

Professarin tosar nógv um samfelagið Føroyar. Hann endurtekur fleiri ferðir, at Føroyar eru so hugtakandi og spennandi við sínum margfeldi. Eisini tosar hann um fyrimunir og vansar við tí lítla og tætta samfelagnum.

– Greiðir fyrimunir eru sjálvandi tey tøttu sosialu bondini, og tað er nógv positivt við siðum. Men hinvegin eru veikleikar í konservatismuni, sum uttan iva blokerar nýhugsanini, ivast hann ikki í.

### Viðurkenning

John Andersen heldur, at aðalmálið hjá granskingini má vera, at upp arbeiða eina viðurkenning av gransking hjá tí politiska myndugleikanum.

– Politikararnir eiga at ávirkast til at síggja, at gransking er neyðug fyri tí fólkaræðisligu og politisku prosessini, staðfestir hann.

Samstundis sum teir skulu venja seg við tankan um, at gransking er ein sjálvstøðug prosess, sum ikki altíð kemur til ta somu niðurstøðuna, sum politikararnir sjálvir.

– Men samstundis skulu granskarar gera sær púra klárt, at politikarar ikki vilja fíggja eina gransking, sum vit kalla fyri fílabeinsgransking. Her meini eg við, at tað má vísast heilt ítøkiligt á, at gransking manglar á ávísum økjum, so at tað ikki bara verður granskað fyri at granska, sigur John Andersen.

Á hendan hátt virkar slíkt báðar vegir, leggur hann afturat.

Skeiðið á granskingardeplinum endaði mikudagin, men John Andersen verður verandi í Føroyum inntil sunnudagin.

# Bátatúrar av Sandoynni

**Jóan Petur Clementsen av Sandi siglir við ferðafólkum runt Skúvoynna og Sandoynna. Báðir túrarnir hugtakandi og spennandi við flottu náttúruni og nógva fuglalívinum í bjørgnunum. Hann sigur tó, at í ár hevur veðrið hilnast øgiliga illa**

FERÐAVINNA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Summarveðrið í Føroyum í ár er ikki komið enn, men tolin bíða flest øll kortini eftir tí. Nøkur velja sjálvandi at leita sær til heitari lond, men summi bíða.

Fyri føroysku ferðavinnuna er tað neyvan so heppið, at veðrið roynist so illa, men kortini verður koyrt við herferð sum eitur frí í Føroyum.

Kunningarstovurnar kring landið skipa fyri gongutúrum, bátatúrum og so framvegis. Og tað átti at borið til, um ein letur seg í eftir veðrinum.

Ein av teimum, sum siglir við ferðafólkið, er Jóan Petur av Sandi. Við hansara báti kann farast runt um Skúvoynna ella vestur um Sandoynna. Báðir túrarnir áhugaverdir og spennandi.

Í okkurt um tveir ella hálvan triðja tíma verður siglt. Har verður eisini greitt frá søguligum støðum og øðrum.

Fløvandi kaffimuðurin umborð man óivað eisini koma væl við. Kanska serliga í ár, tí summarið hevur ikki latið við seg koma – enn í øllum førum.

– Undirtøkan hevur verið so sum so, má eg tíverri siga, sigur Jóan Petur, sum eisini heldur, at tá tað kemur til veðrið eru føroyingar nógv meiri krevjandi enn útlendingarnir.

– Tað hevur verið so vátt og tjúkt í veðrinum. Tað var nógv betur í fjør um enn summarið í fjør ei heldur royndist so væl, sigur Jóan Petur.

Báturin hjá honum tekur 12 fólk. Talan er um ein føroyskan seksæring um 30 føtur.



*Hendan myndin er tikin undir Sandsbjørgunum vestanfyri*

*Mynd: Edvard Joensen*